UTTAN ÚR HEIMI

# Alt varð skolað burtur

**Meiri enn 17.000 fólk doyðu, tá tann næstan tíggju metrar høga flóðaldan rakti strendurnar í fleiri suðurasiatiskum londum**




*Flóðaldur, sum standast av jarðskjálvta undir havbotninum, verða vanliga róptar "tsunami". Kortið vísir, hvar miðdepilin í skjálvtanum var, og hvar flóðaldan gjørdi serliga stóran skaða*

JARÐSKJÁLVTI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Flóðaldan stóðst av einum sera hørðum jarðskjálvta undi havbotninum úti fyri indonesisku oynni Sumatra. Skjálvtin bleiv máldur til 8,9 á Richter-stiganum, og hann er tann ringasti, sum verið hevur tey seinastu 40 árini.

Í gjár var talið á deyðum komið upp í 17.000. Í Sri Lanka vóru 4.857 deyð, í Indonesia 4.448, í India 4.278, í Teilandi 839, í Malaysia 42, á Maldivunum 32, í Myanmar 10, í Bangladesh 2, og heilst vesturi í Kenya kravdi flóðaldan eitt mannalív.

Fleiri túsund norðurlendingar vóru í Teilandi og aðrastaðni á leiðini og hildu jólafrí, og í gjár vistu myndugleikarnir í Danmark at siga, at minst tríggir danir høvdu latið lív. Tað vóru tveir eldri menn og ein smádrongur. Fimm danir vóru ikki afturíafturkomnir. Nógvir norðmenn vóru eisini í økinum, og sambært uttanríkisráðnum í Oslo druknaðu minst fimm norðmenn. Í gjár boðaðu fleiri norðurlendskar ferðamannastovur, at tær fara ikki at senda ferðafólk til tey raktu økini fyribils.

Fólk, sum komu frá tilburðinum við lívinum, greiddu frá, at eingin varnaðist nakað, fyrr enn havið brádliga reisti seg og skolaði inn yvir strendurnar. Alt, sum fyri var, bleiv skolað burtur. Í Sri Lanka verður hildið, at umleið ein millión hava mist hús og heim, og stór landbúnaðarøki standa undir í sjógvi. Altjóða samfelagið fór alt fyri eit undir at savna neyðuga útgerð til tey neyðstøddu, samstundis sum bjargingarlið í teimum einstøku londunum leitaðu eftir fólki, sum ikki vóru komin afturíaftur.

Jarðfrøðingar hava staðfest nakrar minni skjálvtar undir havbotninum við Sumatra síðani tann harða skjálvtan, og teir siga, at tað kann væl henda, at onkur skjálvti kemur afturat.

## Ein av teimum ringastu

Tey seinastu hundrað árini hava fimm stórar tsunami-flóðaldur rakt londini í Suður- og Eysturasia og í Suðuramerika. Tvær teirra kravdu fleiri mannalív enn tann, sum rakti Suðurasia annan jóladag.

Tann 27. august í 1883 doyðu umleið 36.000 fólk av einari flóðaldu, sum skolaði inn yvir stór øki í Indonesia.

15. juni í 1896 rakti ein stor tsunami-flóðalda Japan. Umleið 26.000 fólk doyðu.

Tann 22. mai í 1960 doyðu umleið 1.000 fólk, tá ein flóðalda rakti strondina í Kili.

16. august í 1976 floymdi ein tsunami-flóðalda inn yvir stór øki í Filipsoyggjunum. Meiri enn 5.000 fólk doyðu.

Tann 17. juli í 1998 doyðu umleið 2.000 fólk av einari tsunamiflóðaldu í Papua Ný Guinea.



*Soleiðis sá út í einum býi har suðuri í Teilandi í gjár*